**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**

*STUÐULSSKIPANIN FYRI VAKSIN OG DEILDIN FYRI SINNISVEIK*

# Stuðul til Stuðulsskipanina fyri vaksin

Stuðulsskipanin fyri vaksin søkir eftir einum stuðli til brúkara í Vágum. Tann, ið settur verður, fer í samarbeiði við aðrar stuðlar at arbeiða í skiftandi vaktum. Starvið er normerað til 27 tímar um vikuna at byrja skjótast gjørligt.

Førleikakrøv:

Stuðulsskipanin ynskir ein stuðul við viðkomandi útbúgving m.a. heilsuatstøðing, pedagog, ergoterapeut ella ein við líknandi útbúgving. Um eingin umsøkjari er við útbúgving, kann starvið verða sett við øðrum umsøkjara.

**Vit vænta at tú:**
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans
- Er tolin og hevur eina positiva menniskjafatan
- Kann handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið onki kann sigast um frammanundan

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um starv innan Heimarøktina og Serforsorgina. Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primert ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið hjá Einu Andreasen ella Odu Jóhansdóttir á tlf. 354020.

Umsókn saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu innan 21.08.06 sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Stílað: Oda Jóhansdóttir
Løkjatúni 1
FO-160 Argjum

## Citroën Berlingo HDi 2.0 Diesel



- *Árg. Juni 2005*
- *Koyrt 32.000 km*
- *Tráðleyst centrallás*
- *Servo-stýring*
- *Fløguspælari*

Er brúktur til koyring millum Leirvík og Havn. Til sølu vegna flyting av landinum.
Eyka felgir, uttan dekk, fylgir við.

***Tlf. 227894/443443***

**Mentamálaráðið**
VINNU- OG MIÐNÁMSSKÚLADEILDIN

## SKRIVARI TIL VERKÆTLAN

**Ert tú góð/ur til at arbeiða sjálvstøðugt, dugir væl at samskipa, samskifta og skriva, so ert tú tann persónurin, sum vit leita eftir til verkætlanina – at endurskoða gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar.**

Mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum og ágrýtnum skrivara at arbeiða fulla tíð. Starvið er tíðaravmarkað í 2 ár og verður sett skjótast til ber.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan er at vera skrivari hjá nevndini, sum er sett at endurskoða gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar og at samskipa arbeiðið í sambandi við íverksetan av nýggjari skipan saman við skúlunum. Skrivarin hevur harumframt til uppgávu at leggja til rættis og samskipa arbeiðið við støði í arbeiðssetninginum og samskipa lógararbeiðið, sum skal fremjast í sambandi við íverksetan.

**Uppgávan fevnir m.a. um at:**
- fyrireika og samskipa arbeiðið í sambandi við fundir o.a.
- savna og skipa upplýsingar
- skriva og seta upp frágreiðing
- fyrireika lógararbeiði, t.e. tilevna uppskot til lógir og kunngerðir
- samskipa arbeiðið viðvíkjandi lesiætlanum
- standa fyri kunning og samskifti við skúlar og aðrar áhugabólkar

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar
- hava hægri útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og samstarva við nevndina og skúlarnar á økinum
- hava royndir innan verkætlanarleiðslu og íverksetan
- hava góðan málsligan kunnleika

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. og øðrum viðkomandi skjølum verður at senda til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi tann 4. september 2006, kl. 16.00

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Eyðbjørn Poulsen, deildarstjóra á tlf. 35 50 75 ella á fartelefon 55 50 75.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
Fyriskipanin í Mentamálaráðnum er býtt í 3 deildir – **Fólkaskúladeild, Vinnu- og miðnámsskúladeild og Mentamáladeild**.
**Økið hjá Vinnu- og miðnámsskúladeildini** fevnir um studentaskúlarnar, HF-skeiðini, handilsskúlarnar, teknisku skúlarnar, Fiskivinnuskúlan, Vinnuháskúlan, Klaksvíkar Sjómansskúla, Yrkisdepilin, KT-depilin og lærlingaútbúgvingar.

sansir.fo

## FISKIRANNSÓKNARSTOVAN

Til verkætlanina "Kanning av koralløkjum" lýsir Fiskirannsóknarstovan hervið eftir skipi, sum er minst 50 brt til støddar.
Verkætlanin snýr seg um at kanna hvar og hvussu nógv er til av korallum kring Føroyar.

Talan er um at gera undirsjóvarupptøkur á Suðuroyarbankanum og á Munkagrunninum.
Ætlanin er at byrja seinast í august mánað og halda á í 2 vikur.

Meira fæst at vita við at venda sær til Fiskirannsóknarstovuna tel. 35 39 00.

Sosialurin 341800

Fiskirannsóknarstovan

## Vaskifólk søkist

Søkt verður eftir tveimum vaskifólkum at byrja sum skjótast.

Talan er um eitt 3/4 tíðar starv um dagin og eitt 1/2 tíðar starv eftir kl. 16.00, mánadag til fríggjadag.

Fólkið ið sett verður, má duga væl at arbeiða sjálvstøðugt og verða állítandi.

Fyri dagarbeiðið krevst koyrikort til persónbil.

Ljóðar hetta áhugavert, setið tykkum í samband við Jóannes á tel **211312**

**Vaskarí & Reingering**
**Dalatún 6**
**100 Tórshavn**